Sirið Stenberg
Bjørg Brynhildardóttir Egholm
Høgni Hoydal
Liljan Weihe
Hervør Pálsdóttir
Eirikur í Jákupsstovu
Sámal Petur í Grund
løgtingsfólk

Løgtingið

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um stuðul til ferðaútreiðslur
(Tíðaravmarkað hækking av ferðastuðli)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 93 frá 6. juni 1997 um stuðul til ferðaútreiðslur, sum broytt við løgtingslóg nr. 46 frá 30. mars 2001, løgtingslóg nr. 48 frá 16. mai 2006, løgtingslóg nr. 109 frá 13. desember 2006, løgtingslóg nr. 41 frá 22. mai 2008, løgtingslóg nr. 125 frá 22.desember 2008, løgtingslóg nr. 121 frá 22. desember 2010, løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2015, løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021 og nr. 144 frá 20. desember 2024, verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 2, stk. 2 verður orðað soleiðis:

"*Stk. 2.* Er ferðaleiðin á landi aftur og fram millum bústað og arbeiðsstað:
1) 30 km ella longri, men styttri enn 50 km, er stuðulin kr. 18,50,
2) 50 km ella longri, men styttri enn 64 km, er stuðulin kr. 25,50,
3) 64 km ella longri, men styttri enn 102 km, er stuðulin kr. 32,00,
4) 102 km ella longri, men styttri enn 124 km, er stuðulin kr. 37,50,
5) 124 km ella longri, men styttri enn 146 km, er stuðulin kr. 43,00,
6) 146 km ella longri, men styttri enn 168 km, er stuðulin kr. 48,50,
7) 168 km ella longri, men styttri enn 190 km, er stuðulin kr. 54,00,
8) 190 km ella longri, men styttri enn 212 km, er stuðulin kr. 59,50,
9) 212 km og longri, er stuðulin kr. 65,00."

2. § 2, stk. 2 verður orðað soleiðis:

"*Stk. 2.* Er ferðaleiðin á landi aftur og fram millum bústað og arbeiðsstað:
1) 30 km ella longri, men styttri enn 50 km, er stuðulin kr. 13,50,
2) 50 km ella longri, men styttri enn 64 km, er stuðulin kr. 20,50,
3) 64 km ella longri, men styttri enn 102 km, er stuðulin kr. 27,00,
4) 102 km ella longri, men styttri enn 124 km, er stuðulin kr. 32,50,
5) 124 km ella longri, men styttri enn 146 km, er stuðulin kr. 38,00,
6) 146 km ella longri, men styttri enn 168 km, er stuðulin kr. 43,50,

7) 168 km ella longri, men styttri enn 190 km, er stuðulin kr. 49,00,
8) 190 km ella longri, men styttri enn 212 km, er stuðulin kr. 54,50,
9) 212 km og longri, er stuðulin kr. 60,00.”

§ 2

Stk. 1. § 1, nr. 1 kemur í gildi dagin eftir, at henda løgtingslóg er kunngjørd og hevur virknað frá 1. januar 2026.
Stk. 2. § 1, nr. 2 kemur í gildi 1. januar 2027.

Almennar viðmerkingar
Nú orkuprísirnir eru farnir munandi upp, hevur hetta stórar fíggjarligar avleiðingar fyri fleiri. Ein bólkur, sum verður serliga raktur eru tey, sum koyra lutfalsliga langt til arbeiðis. Við verandi busssambondum ber hjá teimum flestu av hesum illa til at brúka kollektiva ferðslu í staðin, og tí eru tey í sera stóran mun noydd at koyra í egnum bili. Hjá stóra bólkinum av fólki í Føroyum, sum ikki hevur el-bil, geva hækkaðu prísirnir á dieseli og bensini eina sera nógv økta fíggjarliga byrðu, sum tað er trupult hjá hesum bólki at sleppa undan frá degi til dags.

Ein háttur at betra um hesa støðuna, sum ikki eggjar fólki til at koyra meira enn neyðugt, bert er til nyttu hjá fólki við fullari skattskyldu, bústaði og arbeiðsplássi í Føroyum og ikki er ein generell skipan fyri øll, ið koyra bil, er at gera eina tíðaravmarkaða hækking av ferðastuðlinum hjá teimum, sum í dag fáa ferðastuðul fyri koyring eftir vegi. Tað er, sambært løgtingslógini um stuðul til ferðaútreiðslur, fólk, sum hava longri enn 15 kilometrar til arbeiðis (samlaður dagligur flutningur eftir vegi á 30 kilometrar ella meira).

Lagt verður tí upp til at hækka stuðulin hjá øllum, sum í dag kunnu fáa ferðastuðul fyri vegastrekki, við 5 krónum um dagin galdandi fyri 2026. Tað merkir hjá teimum persónum, sum ferðast til arbeiðis fulla tíð (til ber at fáa stuðul fyri upp til 220 dagar), at ferðastuðulin í 2026 hækkar við 1.100 kr.

Ein slík upphædd fyri árið er í allar flestu førum minni enn tað, sum øktu orkuprísirnir hava kostað, men kann vera ein bati í støðuni. Við tað, at hækkaði ferðastuðulin ikki er treytaður av, at pendlarin skal brúka diesel ella bensin, so eggjar støðan við orkuprísunum framvegis til at velja eina aðra loysn, har tað ber til.

Uppskotið hevur ikki verið til ummælis.

Avleiðingarnar av uppskotinum
Mett verður út frá undanfarnum broytingum í ferðastuðlinum, at samlaða útreiðslan av hesum uppskoti er 5 mió. kr. Meirútreiðslan fellur tó ikki fyrr enn í fíggjarárinum 2027, av tí at søkt verður eftir, at árið, ið søkt verður um, er farið.

Samstundis sum hetta uppskotið verður lagt fram, verður eisini lagt fram uppskot um at hækka orkuískoytið í 2026, ið er mett at kosta 3,8 mió. kr.

Tilsamans kosta uppskotini sostatt 8,8 mió. kr., sum er ein útreiðsla, ið er ætlað at koma í staðin fyri eykajáttanaruppskot landsstýrisins upp á 20 mió. kr. fyri tíðaravmarkaða mvg-frítøku av diesel og bensini í summarmánaðunum í 2026.

Hesi bæði uppskotini tilsamans verða tí ein bati hjá landskassanum upp á stívliga 11 mió. kr. samanborið við uppskotið, sum landsstýrið hevur borið Løgtinginum.

Umsitingarligu avleiðingarnar av hesum eru sera avmarkaðar við tað, at TAKS longu frammanundan ger hetta arbeiðið eina ferð um árið.

Uppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri kommunur ella onnur.

Serligar viðmerkingar

Til § 1
Talan er um sama stiga, sum í verandi lóg, men har stuðulssatsirnir á øllum stigum hækka 5 kr. fyri 2026. Frá 1. januar 2027 vera stuðulssatsirnir fyri øll stig teir somu sum í 2025.

Til § 2
§ 2, stk. 1 ásetir, at broyttu stuðulssatsirnir fyri 2026 hava virknað fyri alt árið, t.e. aftur til 1. januar 2026.
§ 2, stk. 2 ásetir, at verandi stuðulssatsir verða settir í gildi aftur 1. januar 2027.

Á Løgtingi, 3. august 2026

Sirið Stenberg	Bjørg Brynhildardóttir Egholm	Høgni Hoydal
Liljan Weihe	Hervør Pálsdóttir	Eirikur í Jákupsstovu
	Sámal Petur í Grund	